

# Atlantic Petroleum leingir sáttmála um framleiðsluskip

**Jan Müller**

17.05.2014 - 13:05

Oljan.fo

Atlantic Petroleum hevur longt sáttmálan um framleiðsluskipið á Chestnut oljukelduni í Norðsjónum við enn einum ári.

"Vit eru sera fegnir um, at samstarvsavtalan við Teekay fyritøkuna um brúk av Hummingbird oljuframleiðsluskipinum er longd, og vit arbeiða eisini við at longja livitíðina hjá feltinum enn meira," sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantic Petroleum.

Partnarar í Chestnut eru Centrica, sum er fyristøðufelag (69.875%), Atlantic Petroleum UK Ltd (15%) og Dana Petroleum (15.125%).

Tað var í 2012, at Atlantic gjørdi avtalu við Teekey um at brúka teirra framleiðsluskip í tvey ár, ein víðkan varð gjørd við enn einum ári í 2013, og nú kemur so eitt ár aftrat við nýggju avtaluni.